# Fólkaflokkurin ikki broytt kós

Jan Müller

-Vit liggja í samráðingum við donsku stjórnina og hava har eina púra greiða strategi. Tað verður so ikki á einum veljarafundi , sum Sosialurin refererar frá, at tað verður kunngjørt, hvussu tað gongur í teimum samráðingunum sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum sigur tað vera púra í leysum lofti, tá Sosialurin ber tíðindi fram frá fundi hjá Vága Fólkafloksfelag í farnu viku. Løgmaður viðgongur tó, at hann kann ikki gera aðrar viðmerkingar, tí hann var ikki við á fundinum.

Tað vóru tó tveir av landsstýrismonnunum hjá Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen og Bjarni Djurholm, sum eisini vóru rættiliga avgjørdir, tá teir úttalaðu seg til blaðið fríggjadagin. Løgmaður heldur tað tó vera langt millum yvirskrift á forsíðuni og innihald í blaðnum henda dagin, har flokkurin varð sagdur at hava broytt kós í fullveldismálinum. - Eg kenni í hvussu er einki til hasa broytingina í fullveldismálinum, sum sipað verður til sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.



Um samráðingarnar við danir sigur løgmaður annars, at trupulleikin er tann, at vit hava ein mótpart, sum ger, at vit bara stampa í sama stað. – Tað er eingin fleksibilitetur í. Hvussu vit fáa donsku stjórnina at spæla við uppá nakað positivt, tað verður so kynstrið frameftir.

Anfinn Kallsberg vísir á, at vit fáa einki ígjøgnum uttan partarnir semjast. Sum støðan er nú, sær tað ógvuliga svart út. M.a. vilja danir hvørki diskutera ella samráðast um tann fíggjarliga partin, sum er ein týðandi partur av øllum. Tí er tað ikki lætt.

Uppá fyrispurning hvussu verður við nógv umrøddu fólkaatkvøðuni sigur løgmaður, at hon verður líka so skjótt sum vit hava ein sáttmála, ið hevur tað innihald, ið vit meta Føroya fólk kann taka undir við. Men hann verður heldur ikki fyrr enn tá.

Nær tað verður veldst um, hvussu samráðingarnar ganga. Og hvørjir møguleikar eru fyri at semjast. Uppá fyrispurning um vit kunnu koma forbí eitt løgtingsval, áðrenn nakað hendir sigur løgmaður, at tað vónar hann ikki. – Eg vóni at tað er so frægt av vilja til at røkka eini avtalu, at tað verður áðrenn næsta val.

## Hydro og Texaco rýma

Fríggjadagin varð skeltið hjá oljufelagnum Texaco tikið av húsavegginum í Vágsbotni og flaggið hjá oljufelagnum Norsk Hydro varð tikið niður fyri seinastu ferð. Tey bæði oljufeløgini, sum hava hildið til í fyrrv. bygninginum hjá Trygd á Bryggjubakka, fingu ikki leitiloyvi í 1. útbjóðingarumfari og lata tí skrivstovur sínar aftur og rýma av landinum. Orsøkin til at tey fara er tann, at feløgini fingu ikki loyvi at leita eftir olju í hesum umfarinum.

## Statoil og BP bora næsta ár

Oljufelagið Statoil, sum er ein av operatørunum á Føroyaøkinum, hevur eftir øllum at døma fingið hendur á einum boripalli, soleiðis at Statoilbólkurin kann bora longu næsta summar. Sambart fyritøkuni Bassoe Offshore Consultants, sum javnan ger støðuna á boripallsmarknaðinum upp, so hevur Statoil gjørt avtalu við risastóra oljupallsfelagið Transocean um leigu av boripallinum Sovereign Exploerer í 105 dagar næsta ár. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa hesi tíðindi váttað. Ætlanin er at bora ein brunn við Føroyar á 1000 metra dýpi og ein vestan fyri Írland.

Eisini BP hevur sambært somu fyritøku gjørt avtalu um leigu av boripallinum Jack Bates desember í ár alt næsta ár. BP skal bora vestan fyri Hetland og møguliga tveir brunnar á 1100 metra dýpi við Føroyar.

Sum skilst roynir Amerada Hess sum operatørur á Føroyaøkinum at finna ein boripall, og her verður Transocean Leader nevndur. Eftir øllum at døma verða tað so helst boraðir fleiri brunnar við Føroyar næsta ár, nakað, sum kemur heldur óvæntað, nú tað hevur verið gitt, at feløgini fóru at hava trupult við at finna boripallar til økið. Ætlanin um at vera í felag um ein pall verður tí neyvan til nakað.

# Fólkaflokkurin má finna út av hvat hann vil

Jan Müller

-Eg fari ikki at úttala meg uppá bakgrund av einum referati av fundi, sum hevur verið í einum lokalum veljarafelag. Eg vil fegin hoyra frá teimum sjálvum, hvat tað er teir hava sagt. Hetta sigur Høgni Hoydal í eini viðmerking til úttalilsini hjá tveimum av landsstýrismonnum Fólkafloksins í Sosialinum í fríggjadagin. Tá søgdu Bjarni Djurholm og Jørgen Niclasen, at teir kunnu ikki taka undir við gongdini í fullveldismálinum, og at vit nú eiga at arbeiða fyri einum stig fyri stig politikki mótvegis dønum.



– Verður hasin boðskapurin ikki avsannaður, so er tað Fólkaflokkurin sjálvur, sum má finna út av, hvat hann vil sigur Høgni Hoydal og heldur fram: – Mín støða er fullkomiliga greið. Vit hava gjørt nakrar avtalur í samgonguskjalinum, og vit hava sagt í tinginum, hvussu vit skulu arbeiða, og tað hava vit hildið fult út.

Hann vísir á, at tað er avgerandi, tá vit eru í eini samráðingarstøðu, at vit vita, at høvuðsendamálið hjá okkara samráðingarmótparti er at fáa split í samgonguna, og tá er tað ógvuliga umráðandi, at menn eru ábyrgdarfullir og loyalir, og at tú er greiður yvir tínum útmeldingum.

Høgni Hoydal vísir á, at hetta mál hevur bygt á púra greiðar avtalur millum samgongupartarnar og løgtingssamtyktir og samráðingarnar eru farnar fram við púra greiðum avtalum við mótpartin, og tað er tað, sum man má halda seg til.

– *Hevur tú varhugan av, at Fólkaflokkurin er við at fáa kaldar føtur og er við at draga í land aftur í fullveldisspurninginum?*

– Eg geri ikki viðmerkingar til tað, sum Fólkaflokkurin ger. Vit hava skipað eina samgongu. Anfinn Kallsberg er samgonguleiðari. Hann hevur sagt púra klárt og týðuligt, at tað einasta, sum skal góðtakast í samráðingunum millum Føroyar og Danmark, er ein fólkarættarlig avtala tvs. ein avtala, sum inniber suverenitet.

Formaður Tjóðveldisfloksins sigur, at annað er ikki at samráðast um, tí tá er tað í veruleikanum nýggj heimastýrislóg vit tosa um. Eru onnur signal frá samgonguni, so má hetta vera nakað, sum Fólkaflokkurin tekur upp innanhýsis.



# Norröna aftur klár at sigla leygardagin




*Norrøna hevur á beding í ein mánaða , men nú er hon liðug aftur og verður sett í sigling leygardagin*

Áki Bertholdsen

Í hesi vikuni verður Norrøna aftur klár at seta í millumlandasigling.

Hendan seinasta mánaðin hevur hon verið á skipasmiðju í Fredericia, har ymiskt er gjørt við hana, eitt nú skuldi broytingar gerast umborð fyri at lúka altjóða skipasýniskrøvini.

Størsta broytingin umborð er, at biladekkið er býtt sundur í tríggjar deildir við vatntættum skottum, so at um sjógvur skuldi komið inn á biladekkið, sleppur hann bara um ein part av skipinum, og ikki um alt skipið. Somuleiðis eru bulbar gjørdir upp á reyvuna á henni, tað er eisini gjørt fyri at kunna halda krøvini um flótievni.

Áki Jespersen á Smyril Line sigur, at hetta arbeiðið er nú komið so langt, at Norrøna verður klár at seta í millumlandasigling aftur nú leygardagin .

Fyrsta fráferðin verður úr Hanstholm leygardagin, til Føroya og so fer hon avstað aftur mánadagin.

Millumlandasiglingin hevur verið so mikið væl eydnað, at tað hevur verið neyðugt at sigla fleiri ferðir, tí tað er ov lítið bara at sigla eina ferð.

Í vetur er siglingin skipað soleiðis, at líka vikur siglur hon tvær ferðir og ólíka vikur siglur hon eina ferð ímillum Hanstholm og Havnina.

Umframt at farmurin er nógvur, er tað eisini alsamt fleiri ferðafólk at flyta. Fyrsta túrin eru eini 80 ferðafólk við og annan túrin aftur skulu 100 ferðafólk við.

## Landssjúkrahúsið umvælast fyri 35 mió

*–Bygningarnir eru í so ringum standi, at verður onki gjørt heilt skjótt, fara teir fyri skeytið*

Áki Bertholdsen

Næsta ár skal Landssjúkrahúsið umvælast fyri 35 milliónir krónur.

Tað er í hvussu so er ætlanin hjá Landsstýrinum.

Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri komandi ár, sum er løgd fyri tingið, hevur landsstýrið sett 35 milliónir av til at umvæla Landssjúkrahúsið fyri. Í ár vóru 10 milliónir settar til umvælingar, so næsta ár er upphæddin meiri enn trýfaldað.

Landsstýrið sigur, at tað hevur leingi verið illgruni um, at bygningarnirhjá Landssjúkrahúsinum eru rættiliga illa farnir.

Fyri 13 árum síðani byrjaði arbeiðið at umvæla bygningarnar, men í kreppuni, var játtanin tikin av og tá helt arbeiðið uppat.

Í fjør setti landsstýrið so eina kanning í verk av støðuni. Úrslitið av hesi kanning vísir, at illgrunin um, hald var í illgrunanum um, at standurin var heilt ringur og at vandi er fyri, at bygningarnir fara fyri heilt fyri skeyti, um ikki okkurt verður gjørt heilt skjótt.

Kanningin vísir, at bæði bygningar og installatiónir krevja stórar ábøtur. Nakrar av hesum ábøtum eru so álvarsligar, at ábøtur mugu gerast heilt skjótt.

Tilsamans verður mett, at umvælingarnar fara at kosta 208 milliónir.

Landsstýrið ætlar, at arbeiðið skal byrjað næsta ár og hevur skotið upp at seta 35 milliónir av til endamálið. Ætlanin er so, at arbeiðið skal halda fram út í eitt til í 2010, tá ið alt skal vera liðugt.

**Stórt viðlíkhald**

Annars krevur Landssjúkrahúsið eisini stórt viðlíkahald fyri at bygningarnir ikki skulu forfella upp aftur meiri.

Og tá ið arbeiðið at umvæla teir er liður, krevst eisini eitt vælskipað viðlíkahaldsarbeiðið, so at Landssjúkrahúsið ikki aftur kemur í somu støðu sum nú.

Landsstýrið roknar við, at tey komandu árini fer viðlíkahaldsarbeiðið at kosta 68 milliónir. Men tað er kortini ongin serstøk játtan sett av til tað endamálið.

# Fólk sum eru dømd fyri siðamisbrot fáa sálarfrøðing

*Kriminalforsorgin heldur, at tað er neyðugt, at slík viðgerð kann veitast í Føroyum*

Áki Bertholdsen

Tey, sum verða dømd fyri siðamisbrot, eiga at kunna fáa sálarfrøðiliga viðgerð, tá ið tey hava sitið.

Tað heldur Landsstýrið, og tí er uppskot sett fram um at játta pening til endamálið á fíggjarlógini fyri komandi ár, sum varð løgd fyr itingið herfyri.

Landsstýrið sigur, at í Danmark er tað so, at táið fólk, sum eru dømd fyri siðamisbrot, hava sitið eina tíð, fáa tey tilboð um sálarfrøðiliga viðgerð, um tey annars verða mett at vera skikkað til tað.

Men sum støðan er nú, hevur psykiatriska deild Landssjúkrahúsinum afturvíst einum ynski frá kriminalforsorgini um at átaka sær uppgávuna at veita fólki, sum eru dømd fyri siðamisbrot psykologiska og, ella psykiatriska viðgerð.

Hinvegin heldur kriminalforsorgin, at tað er neyðugt, at slík viðgerð kann veitast í Føroyum.Víst verður á, at hetta er ein vaksandi trupulleiki og at tað tí er neyðugt, at psykiatriska deild verður før fyri at veita hesa viðgerðina. Hendan viðgerð skal fara fram um eitt longri ella styttri viðgerðarskeið.

Landsstýrið sigur, at yvirhøvur er psykiatriska deild ógvuliga ovbyrjað, eisini innan onnur øki.

Tí hevur Helena Dam á Neystabø gjørt av at hækka játtanina so mikið, at ein sálarfrøðingur kann setast í starv afturat og tað hevur hon skotið upp í uppskotinum til fíggjarlóg fyri komandi ár.




*Siðamisbrot er ein vaksandi trupulleiki í Føroyum. Tí halda bæði Landsstýrið og Kriminalforsorgin, at tað er neyðugt, at tey fólk, sum verða dømd fyri siðamisbrot, eisini kunnu fáa sálarfrøðiliga hjálp, tá ið tey hava sitið*

**Móttøka**

Páll Kunoy er settur í starv sum deildarstjóri í nýstovnaðu sjóvátryggingardeild okkara frá 1. oktober 2000.



Í hesum sambandi verður móttøka, har núverandi og komandi viskiftafólk hjá TRYGD, eins og vinir og kenningar hjá Pálli, eru vælkomin at støkka inn á gólvið í høvuðsskrivstovuni í Tórsgøtu 16, hósdagin 5. oktober, millum kl. 15 og kl. 17.

TRYGD